

*Carpark North, f.v. Søren Balsner bass og ljómborð, Lau Højen sang og gittar, Morten Thorhauge trummir.*

# Carpark North til Føroya

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Danski superbólkurin Carpark North sigur á heimasíðu síni, at bólkurin fer at spæla fýra konsertir í Føroyum í september.

Í konsertkalendaranum hjá bólkinum stendur at 22., 23., 24., 25. september spæla teir í Føroyum. Enn er navn tó ikki sett á øll spælistøðini.

Í Ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum, sum verður borið í hvørt hús í hesum døgum, stendur lýsing um at bólkurin spælir í Mentanarhúsinum. Men her er bert talan um eina konsert, hvar hinar tríggjar verða er enn óvíst.

Egin elektroniskur popprokkur Carpark North eru í løtuni á konsertferð í sambandi við útgávuna av teirra seinnu fløgu. Fløgan "All things to all people" vísir ein sera búnan bólk, sum hevur arbeitt við sínum tónlistarliga útrykki. Løgini eru ordiliga fangandi við melodiskum niðurløgum, og blandi millum rokk, popp og forritan er gjøgnumført. Fløgan er upptikin av kenda tónleikaframleiðarum Joshua, sum fyrr hevur framleitt eitt nú Kashmir og Mew, umframt fyrru fløguna hjá Carpark North. Ljóblandið hevur Michael Patterson staðið fyri. Hann hevur fyrr ljóðblandað Beck, B.R.M.C., P. Diddy, J Lo og onnur.

### Mest spælda lag í donskum útvarpi

Fyrra fløgan gjørdist nummar eitt á danska sølulistanum, og lagið "Transparent and glasslike" lá á ovastu rók á Tjeklistanum hjá P3 leingi. Lagið var harumframt mest spælda lag í donskum útvarpi í 2003. Í Føroyum hevur bólkurin eisini nógvar fjepparar, og bólkurin hevur verið í uppskoti á nógvum kjakheimasíðum, tá tosað hevur verið um nøvn til festivalarnar.

Fyrsta stakfløgan av seinnu fløguni "Humans" fór beinleiðis inn á Tjeklisten á ovastu rók, og lá har í tríggjar vikur, eisini næsta stakfløgan "Best day" hevur klárað seg væl á Tjeklisten, og hevur ligið millum tey ovastu løgini í fleiri vikur.

### Ummælarar og áhoyrar á einum máli

Ummælarar tykjast samdir um, at Carpark North við "All things to all People" hava skapt eina frálíka fløgu, sum er uppaftur betur enn tann fyrra. Tildømis sigur melodic.net, at fløgan tekur lurtaran til ein Eden av tónleiki. Gaffa sigur at niðurløgini eru teirra størsta styrki, og at tú megnar slettis ikki at standa í móti tónleikinum, tá tey fangandi niðurløgini byrja. Sama tíðarrit ummælir konsert hjá bólkinum í Århus og sigur, at konsertin við bólkinum var mega góð, og at bólkurin til fulnar megnar at flyta tað stóra og vælframleidda fløgu útrykki upp á tónleikapallin.

Nú fáa føroyingar so høvið at hoyra bólkin. Hetta verður spennandi og verður uttan iva ein av mongum frálíkum tónleikaupplivingum hetta summarið.


## Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Bøllebob og Smukke Sally**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 20.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |




**Hostage**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 20.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |




**War of the Worlds**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 20.07 | kl. 19.30 | |
| Hósdag | 21.07 | kl. 19.30 | Seinasta sýning |




**Sahara**

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 20.07 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 22.15 |

**Komandi filmar**




**Batman Begins** FRUMSÝNING

Fríggjadag 22.07




**A Lot Like Love** FRUMSÝNING

Fríggjadag 22.07

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu